# Við veðrum no




**Veðrið var tí fagrasta hetta mánakvøldið 30. apríl, tá 12 miðvingar, 12 veðrar og ein tíðindamaður løgdu til brots av Oyrargjógv**

*Orð&myndir: Snorri Brend*

Hann hevði ligið við lágætt nakrar dagar, og nú vóru bæði veður og alduhædd til vildar.

Endamálið hjá hesum víttfevnda ferðalagnum var at sigla hesi heystlombini norður í Miðvágsurð.

Komnir á staðið, vórðu veðrar og manning stjórað í land við lítlari jollu, og síðani vórðu teir ferføttu sleptir leysir.

Her sleppa teir at ganga til einaferð út í september mánað, tá farið verður eftir teimum aftur.

Við í ferðalagnum vóru hesir 12: Kári á Presttrøðni, Tórður á Presttrøðni, Neinbjørn Nattestad, Wensil Nattestad, Dagfinn Petersen, Dagbjørn Hansen, Jónleif Jørgensen, Rani Hanusarson, Jón Jørgensen, Kenneth Gaardlykke, Gerhard Hansen og Jóhannus Nattestad.



*Dagbjørn Hansen hvílir seg eina løtu*



*Veðrarnir eru komnir væl umborð á bátin. Leiðin er løgd norður á Urðina. Á myndini síggjast Neinbjørn Nattestad og Jónleif Jørgensen*



Sosialuri